# Faroexpo stóran týdning fyri o




*- Við slíkum vinnustevnum víðka vit okkara sjónarring, sum er so týdningarmikið fyri eitt samfelag sum Føroyar, segði Bjarni Djurholm, tá ið hann í morgun setti Faroexpo í Ítróttarhøllini í Runavík*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**- Skulu vit framhaldandi hava vøkstur og eitt livandi samfelag, mugu vit stuðla uppundir slíkt tiltøk sum hetta, ið víðka um okkara sjónarring, sum er so týdningarmikið fyri eitt samfelag sum Føroyar, segði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, tá ið hann setti Faroexpo í morgun**

FAROEXPO 06
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var Bjarni Djurholm, landstýrissmaður í vinnumálum, sum setti altjóða vinnustevnuna Faroexpo í Ítróttarhøllini í Runavík í morgun.

Bjarni takkaði fyrst fyriskiparunum, sum standa aftanfyri tiltakið, fyri, at hann sum landsstýrismaður varð boðin at hava "the opening speech", sum hann segði á enskum.

**Stóran týdning**
Hann segði, at hetta er aðru ferð, at Faroexpo verður sett í Runavík, og har høvi verður hjá føroyskum fyritøkum á henda hátt at hitta útbjóðarar úr øðrum londum.

Landsstýrismaðurin legði dent á tann týdning, tað hevur, at føroyingar soleiðis taka til sín vitan – og kunnu geva vitan frá sær til aðrar.

- Eitt slíkt tiltak sum hetta hevur stóran týdning fyri Føroyar og fyri lokalsamfelagið.

Hann segði, at tað hevur stóran týdning fyri framhaldandi vinnuligan vøkstur, og vísti á, at Faroexpo-tiltakið sampakkar væl við tann politikk, sum landsstýrið hevur sett út í kortið - ein politikk, sum byggir á upplýsing, samskifti, vitan og vøkstur – umframt menniskjansligar resoursir, sum hann eisini tók til.

**Sjónarringurin**
Bjarni Djurholm segði, at skulu vit framhaldandi hava vøkstur og eitt livandi samfelag, mugu vit stuðla uppundir slíkt tiltøk sum hetta.

- Soleiðis víðka vit okkara sjónarring, sum er so týdningarmikið fyri eitt samfelag sum Føroyar, segði hann.

At enda í røðu síni endurtók landsstýrismaðurin tøkkina til tey, sum hava tikið stig til og standa aftanfyri vinnustevnuna Faroexpo.

Vit kunnu leggja aftrat, at tað er Eysturoyar Vinnulívsfelag, sum stendar aftanfyri tiltakið - og til at stinga úr í kortið, hevur felagið ein stýringsbólk, sum umboðar felagið og Runavíkar kommunu sum vertskommunu.

**Suð sang**
Eftir setanarrøðuna hjá landsstýrismanninum sungu og undirhildu fýra sangarar úr bólkinum Suð.

Hetta var lívligur og frískur sangur, sum avgjørt setti sín dám á løtuna í morgun.

Tá ið setanarrøða og sangur vóru av, bjóðaði Árni Joensen úr Oyndarfirði, vinnulívsmaður og fyrrverandi borgarstjóri, øllum til vælbúgvið morgunmatarborð. Borðreitt varð bæði við breyði og viðskera umframt øðrum góðum bakstri aftur við kaffi og øðrum leskandi.




*Føroya Sparikassi er høvuðsstuðul aftanfyri Faroexpo og mentanarvikuna. Longu stundisliga í morgun vóru teir vælmannaðir á básinum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*